## Bankastjórar ov góða løn

Nú um dagarnar kom fram, at hóast amerikanski tjóðbankin noyddist at taka um endan fyri at bjarga einum íløgubanka, fáa stjórarnir í íløgubankanum ovurhonds stóra samsýning umframt ta føstu lønina. Tað hevur eisini víst seg, at bankastjórar hava yvirhøvur góðar lønarsáttmálar, og tað fekk í gjár bretska forsætisráðharran at gera vart6 við sína misnøgd. Við BBC segði Gordon Brown, at hann fer at virka fyri at fáa reglurnar broyttar í Bretlandi, og at tað eisini verður gjørt í øðrum londum.



*Gordon Brown*

# Arbeiða ókeypis fyri at hjálpa øðrum

**Hesa vikuna, fara skótar at arbeiða fyri fólk fyritøkur og har teir lata alla lønina fara til vælgerandi endamál fyri at hjálpa illa støddum børnum í Føroyum og uttanlands**

SKÓTAHJÁLP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er eitt afturvendandi tiltak á hvørjum ári, at skótarnir kring landið fara undir eitt tiltak, tey nevna Skótahjálpin og skótar fara út at arbeiða fyri privatfólk og fyritøkur og lata peningin fara til tiltøk, ið kunnu hjálpa illa støddum børnum í Føroyum og uttanlands. Hvørt ár verða tvær verkætlanir stuðlaðar, ein í Føroyum og ein uttanlands.



*Børn hjá sálarliga sjúkum foreldrum, bera aloftast sínar tankar og kenslur fyri seg sjálvan. Men sálarligu trupulleikarnar hjá foreldrunum fylla so nógv í hugaheiminum hjá teimum, at tað er neyðugt at hjálpa teimum og tað er eitt endamál við Skótahjálpini í ár*

### Smáir herðar-stór ábyrgd

Føroyska verkætlanin í ár nevnist "Smáir herðar – Stór byrða" og hon miðjar eftir at hjálpa børnum hjá sálarsjúkum foreldrum.

Tá ið mamma ella pápi gerast sálarsjúk, verða børnini noydd at fyrihalda seg til nógv viðurskifti, ið tey ofta ikki eru búgvin til og sjúkan hjá foreldrunum fær tey at taka stóra ábyrgd heima við hús. Aloftast bera tey sínar tankar og kenslur fyri seg sjálvan,

Men sálarligu trupulleikarnar hjá foreldrunum fylla nógv í hugaheiminum hjá børnunum og tey kunnu lættliga fáa eina fatan av, at tað er okkurt tey hava gjørt ella sagt, sum hevur gjørt foreldrini sjúk.

Fáa hesi børn ikki hjálp og stuðul setur hetta eisini spor eftir sær í vaksna lívinum hjá teimum.

Endamálið við verkætlanini er at hjálpa hesum børnum við at gera tilfar til bæði børnini og foreldrini, umframt at seta á stovn samrøðubólkar fyri børn hjá sálarsjúkum.

Tá ið børn í grannalondum okkara, sum eru í slíkari støðu, verða spurd, hvat hevur hjálpt teimum best, siga flest øll, at tað besta er at hitta og práta við onnur børn í somu støðu, sum tey sjálvi.

### Barnaheim fyri heimleysar gentur

Útlendska verkætlanin í ár er eitt heim fyri heimleysar gentur í Sumbawanga í Tansania í vestur Afrika. Í Sumbawanga búgva eini 80.000 fólk og mett verður, at eini 300 børn liva á gøtuni.

Felagsskapurin, Fremtid og Håb, arbeiðir ímillum gøtubørnini í Sumbawanga og hann hevur høvuðsstøð í Danmark. Nýggjasta tiltakið hjá felagsskapinum er eitt heim fyri gentur og í vár fluttu 10 gentur inn í barnaheimið. Peningurin, sum verður innsavnaður í skótahjálpini í Føroyum, fer til at geva gentunum mat, klæðir, skúlagongd og læknahjálp. Ein partur fer eisini til lønina hjá starvsfólkunum, og til at leigu fyri húsið, har barnaheimið heldur til.

Eftir at hjúnini Hans Michael og Sólfríð í Mittúni úr Klaksvík høvdu arbeitt á barnaheimunum í Sumbawanga í fjør, avgjørdu tey, at gera ein stuðulsbólk, ið kallast Framtíð og vón, og sum hevur til endamál at standa fyri at fíggja raksturin av gentubarnaheiminum.

# Klaksvíkingar umhugsa at herða kósina ímóti Hvannasundi

**Klaksvíkar Býráð fer nú at viðgera um tey í Hvannasundi framvegis skulu sleppa at brúka ymsar tænastur í Klaksvík fyri einki. Vit kunnu illa forsvara mótvegis okkara skattaborgarum, at lata onnur brúka tænastur í Klaksvík ókeypis, sigur borgarstjórin**

KOMMUNALAR TÆNASTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er ikki vist, at Hvannasunds Kommuna í framtíðini fer at sleppa at brúka ymsar tænastur í Klaksvík fyri einki.

Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, sigur, at Klaksvíkar Býráð nú má viðgera spurningin um at Hvannasunds Kommunu at gjalda fyri tær tænastur, sum teirra borgarar brúka í Klaksvík.

Hann vísir á, at Hvannasunds kommuna hevur ongantíð goldið fyri tær tænastur, sum teirra borgarar hava brúkt í Klaksvík.

- Men er haldi ikki, at vit kunnu forsvara mótvegis okkara egnu skattaborgarum, at vit lata borgarar úr øðrum kommunum brúka tær tænastur, sum eru í okkara kommunu, uttan at betala fyri tað, sigur hann.

Ein tænasta, sum tey í Hvannasundi brúka ókeypis í Klaksvík, er læknamiðstøðin.

Hann sigur, at burtursæð frá eini smávegis upphædd fyri fleiri árum síðani, hevur Hvannasunds Kommuna onki goldið fyri at teirra borgarar hava brúkt læknamiðstøðina.

Annars er tað Klaksvíkar Kommuna, sum hevur bygt miðstøðina og rindar raksturin - tó skal leggjast afturat, at aðrar kommunur í Norðoyggjum rinda fyri at brúka hana.

Steinbjørn O. Jacobsen sigur, at tey í Klaksvíkar Kommunu hava onki tíma at gjørt við hetta, tí tey væntaðu, at báðar kommunurnar vórðu lagdar saman skjótt.

Men nú Hvannasund hevur gjørt av at standa uttanfyri, mugu tey taka spurningin upp.

### Roknaði við tí

Hetta er akkurát tað, sum ein av teimum heilt kendu hvannasundsmonnunum, Absalon í Buð, umrøður í bersøgnari grein í Norðlýsinum herfyri og sum hann heldur, kann gerast avleiðingin av, at Hvannasund ikki leggur saman við Klaksvík.

Hann vísir á, at læknamiðstøðin í Klaksvík kostaði einar 16 milliónir krónur at byggja og at bygdaráðið í Hvannasundi samtykti at taka lut í útreiðslunum eftir fólkatalinum.

- Kommunan hevur onga krónur goldið enn og við rakstri og rentum, er bara hetta ein rokning uppá eina tvær milliónir krónur til Hvannasunds Kommunu.

Hann væntar eisini eina rokning til Hvannasunds kommunu fyri at ungdómur í Hvannasundi okkara brúkar Ungdómshúsið í Klaksvík.

- Vóni tit rætta ryggin, og gjalda fyri nassaríði, heldur enn at spilla grannakommununa út fyri, at verða fíggjarliga illa fyri, ljóðar kontanta viðmerkingin frá hvannasundsmanninum til síni bygdarfólk.



*Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, heldur, at tað er ivingarsamt um tað kann blíva við, at fólk í Hvannasundi brúka tænastur í Klaksvík fyri onki, tí kann ein rokning vera á veg norður um fjallið til Hvannasunds Kommunu*